

*Hotel Føroyar hevur seinastu tíðina verið karmur um visjónstorgini, har strategibólkarnir, sum arbeiða við visjón 2015, hava greitt frá tí, sum higartil er fest á blað. Kjak hevur eisini verið um framløgurnar*

# Visjónir fyri íverksetan

**Vinnulóggávan skal fylgja altjóða reglum fyri at styrkja føroyskar fyritøkur á útflutningsmarknaðinum, ein samskipað marknaðarføring av føroyskum vørum og tænastum uttanlands skal styrkjast, og ein íverksetaraportalur skal setast á stovn**

ÍVERKSETAN
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Strategibólkurin, sum arbeiðir við visjónum um íverksetan, hevur sett sær nøkur mál, ið skulu hjálpa teimum, sum ætla sær í gongd við vinnuligt virksemi, fram á leið. Bólkurin ætlar, at visjónirnar skulu bera so langt, at Føroyar í 2015 eru ein íverksetaradepil, ið dregur fólk úr øllum heiminum til sín.

– Í 2015 sleppur íverksetarin at fokusera upp á hugskotið og at vinna pening, tí allar forðingar skulu beinast av vegnum.

Bólkurin fer eitt nú at arbeiða við 1) íverksetarahugburði, 2) íverksetaraskipanum, 3) fíggjarmøguleikum, 4) skattligum viðurskiftum, 5) lógarkørmum og reglum og 6) Eini smidligari almennari fyrisiting.

### Hugburður og skipanir

– Málið er, at Føroyar skulu mennast til at verða eitt áhugavert stað hjá virkisfýsnum fólki at byrja nýggjar vinnur.

Hesi mál skulu náast við einum fjøltáttaðum útbúgvingarverki, sum skal verða ein virkin partur í at ala fram ein íverksetarahugburð í føroyska samfelagnum.

– Tað skal loysa seg at skapa sín egna vinnuveg, tí samstundis sum íverksetarin tekur váða á seg, skulu útlitini til at vinna pening verða góð.

Um málini við íverksetaraskipanum, sigur bólkurin, at virksemið við ráðgeving og íverksetaranetverkum skal styrkjast.

– Íverksetararáðgeving skal savnast á einum staði, íverksetaranetverk skulu viðurkennast og mennast, og hesi skulu knýtast saman við onnur altjóða netverk.

### Fígging og skattur

Bólkurin heldur, at gjøgnumskygd atgongd til menningarfígging, sum setir krøv til íverksetaran, eigur at styrkjast.

– Stuðulsskipanir til serstøk menningar-og marknaðarførsluátøk skulu styrkjast, og ventur- og sáðkapitalmarknaðurin skulu føra føroysku íverksetarahugskotini út í lívið. Karmar skulu skapast fyri einum ventur-kapitalmarknaði og granskingar-og sáðkapitalgrunnum.

Strategibólkurin hevur eisini sett sær fyri, at skattaskipanin í Føroyum verður lokkandi fyri íverksetarar. Skattligu karmarnir skulu gerast lagaligari, eins og skattligu karmarnir kring virðisbrævaoptiónir til starvsfólk skulu gerast lagaligari.

### Lógarkarmar, reglur og fyrisiting

– Umsitingarligu reglurnar skulu gerast lættari og greiðari at virka undir, og minkast skal um føroyskar serreglur.

Bólkurin heldur, at vinnulóggávan og reglur annars skulu gerast lagaligari fyri smærri virkir, soleiðis at hesi ikki drukna í fyrisitingarligum uppgávum.

– Vinnulóggávan skal fylgja altjóða reglum fyri at styrkja føroyskar fyritøkur á útflutningsmarknaðinum.

Um fyrisitingina, sigur bólkurin, at lættast skal um fyrisitingarligu byrðarnar hjá íverksetarum.

– Tænastur, sum hava týdning fyri íverksetaran, skulu samskipast á einum staði.

Tað merkir tó ikki, at privatar ráðgevingarfyritøkur ikki eisini kunnu virka úti í økjunum.

Bólkurin hevur eisini sett sær sum mál, at ein íverksetara-portalur skal setast á stovn, eins og samskipað marknaðarføring av føroyskum vørum og tænastum uttanlands skal styrkjast.

## FAKTA UM BÓLKIN

Í strategibólkinum um íverksetan, sum hevði framløgu á "visjónstorginum" á Hotel Føroyum í síðstu viku, sita:

Kitty May Ellefsen, formaður
Áki Johansen
Gloria Kalsø
Oddbjørg Højgaard
Regin W. Dalsgaard
Gissur Patursson

# Íverksetarar dru

**Tað var Kitty May Ellefsen, formaður í visjónsbólkinum um íverksetan, sum hevði framløguna vegna bólkin. Hon heldur, at føroyingar bæði eru kreativir og dáma væl at arbeiða. – Men stórur vandi er fyri, at tú sum íverksetari druknar í pappírsveldi og umsiting. Ljósið, sum brendi, slóknar og hugskotini fara í bláa luft, sum hon tók til**

ÍVERKSETAN
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Kitty May Ellefsen segði, at tá ið arbeiðsbólkurin fekk til uppgávu at seta sær mál fyri íverksetan, vóru tey í fyrsta lagi noydd at vita, hvar vit føroyingar eru staddir í dag.

– Áðrenn vit seta út í kortið, hvar vit ætla okkum, er neyðugt fyrst at vita, hvar vit standa.

Í hesum sambandi reisti hon spurningin, hvussu støðan hjá føroyskum íverksetarum er í dag?

### Langur og tungur

– Vit tosa ofta um at fáa føroyingar heim úr útlegd, tá ið tey hava verið burturi og lisið, og her heldur arbeiðsbólkurin, at øll fólk eiga at vera vælkomin at royna sínar gávur í Føroyum.

Hon helt, at føroyingar eru kreativir og dáma væl at arbeiða.

– Innan nógvar vinnur, eitt nú sniðgeving, tónleik og KT, síggja vit kreativitetin í fólkinum, segði Kitty May.

Hon segði, at nógv hugskot koma undan kavi, men sambært føroyskum íverksetarum sjálvum, er vegurin frá góðum hugskotum til veruleika bæði langur og tungur.

– Tað er eingin góða mamma, sum kann lofta hugskotunum.

Hon legði dent á, at forðingar mugu beinast av vegnum, so Føroyar kunnu gerast ein blómandi íverksetanardepil í altjóða høpi fyri 2015.

### Jantelógin sterk

Kitty May vísti á, at jantelógin er sterk í Føroyum, og hon verður løgd niður í okkum longu í barnaárum.

– Tú skalt jú ikki halda, at tú ert nakað sum helst, men liva eitt stilt og friðarligt lív við útbúgving og helst starvast hjá tí almenna, har pensjónin er tryggjað.

Hon segði, at íverksetarin, sum hevur roynt at kollsiglt við sínum virki, verður stemplaður fyri lívið





*– Íverksetan skal røkka inn um skúlans gátt. Vit halda, at ein og hvør 9. floks næmingur eigur at duga at gera ein íløguætlan, segði Kitty May Ellefsen á visjónstorginum*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*